# Bilførarin sovnaður –orsøk til nógvar ferðsluvanlukkur

**Kanningar aðrastaðni vísa, at fjórða hvør ferðsluvanlukka stendst av, at bilførarin er sovnaður undir koyring. Orsøkirnar kunnu vera manglandi svøvnur, heilivágur, rúsdrekka ella vanlig møði**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*

Hóast flestu bilførarar vita, at man skal halda seg frá rúsdrekka, sissandi heilivági og øðrum rúsandi evnum, tá man koyrir bil, eru tað alt ov nógv ið ikki taka hetta í álvara og eru tí í vanda fyri at verða orsøk til álvarsligar ferðsluvanlukkur, ið raka bæði tey sjálvi og onnur. Tað er tann sokallaði sekundsvøvnurin, ið er sera vandamikil undir koyring. Talan er ikki um at bilførarin sovnar so líðandi, men at hann har afturímóti leingi hevur siti og stríðst við svøvnin, siti óróligur, skrúva rútin niður fyri at fáa fríska luft og uppaftur tá tað er blivið ov kalt, merkt smáar ristingar í kroppinum, til hann at enda er sovnaður. Í hesum førið er bilførarin klárur yvir at hann er við at sovna, men hann gevur sær ikki tíð til at steðga á og fara út úr bilinum.


Granskarar gera nógv burturúr at kanna svøvnin hjá bilførarum í øllum aldursbólkum


*Við nógvar danskar landavegir og motorvegir er eitt óslætt øki úti við vegjaðaran, sum ger at bilurin fer at rista og larma, tá hjólini raka hetta økið. Hetta er fyri at vekja bilføraran*

### Nakrar meginreglur

Fyri at umgangast at sovna við rattið, eru nakrar meginreglur at halda seg til. Til dømis hevur tað stóran týdning at vera væl fyri, tá man skal koyra longri túrar. Ikki eta ov nógv áðrenn ein longri biltúr ella drekka alkohol kvøldið fyri. Um onnur ferðandi eru við í bilinum, mugu tey halda vakið eyga við, at bilførarin ikki er við at sovna. Eisini skal hitin í bilinum vera passaligur. Um bilførarin byrjar at geispa fleiri ferðir og koyrir óregluliga, er tað uppá hægstu tíð at gera ein steðg. Bara tað at bilførarin verður burtur ein brotpart av einum sekundi, kann elva til eina álvarsliga ferðsluvanlukku.

*Kelda: FDM / Motor*

## Lexus í science fiction



Tveir Lexus konseptbilar eru gjørdir til ein nýggjan science fictionfilm hjá Steven Spielberg. Bilarnir, ið eru gjørdir á einari amerikanskari Lexus teknistovu, skulu vera við í filminum "Minority Report."

*Kelda: bilpriser.dk*

## Honda CR-V



Seinasta EuroNCAP-testin vísti, at tað eydnaðist Honda CR-V at fáa besta karakter í SUV-klassanum. Teir høvdu bestu trygd við ein samanstoyt við fótgangarar

*Kelda.: bilpriser.dk*

## Toyota flogfør



Royndarflúgvingin hjá Toyota eydnaðist væl, tá teir herfyri royndu teirra nýggja flogfar í Mojave oyðimørkini í California. Talan er um eitt flogfar úr heilstoyptum kolfiburskrokki við einum motori og fýra sitiplássum

*Kelda: bilpriser.dk*

# Bjóða føroyingum við til Goodyear Classic

**Tá Goodyear sølustjórarnir herfyri vóru á vitjan í Føroyum, bjóðaðu teir føroyingum við til "Goodyear Classic" koyringina fyri ellisakfør, sum verður frá 23. til 24. august í ár.**

GOODYEAR CLASSIC
*Magnus Gunnarsson*


*Goodyear sølustjórin í Norðanlondum og Baltisku londunum, Kenneth Saust, Fríðrikur Bláhamar frá Super Dekk og Flemming Christensen sølustjóri hjá Goodyear í Danmark. Teir bjóða nú føroyingum at vera við til árligu "Goodyear Classic" koyringina fyri ellisakfør í Danmark*

Goodyear sølustjórin í Norðanlondum, Kenneth Saust, og sølustjórin í Danmark, Flemming Christensen, eru báðir sera áhugaðir í gomlum bilum. Kenneth Saust arbeiðir í løtuni við at seta ein Toyota Corolla KE35, Rallyebil frá 1975, í stand og Flemming Christensen hevur ein Chevrolet frá 30- árunum. Í Danmark skipa Goodyear aftur í ár fyri árligu koyringini við ellisakførum í august mánað. Koyringin er fyri øll bilmerkir sum á ein ella annan hátt hava verið við í rallye ella aðrari kappkoyring. Stórt sæð kunnu øll ellisakfør vera við í hesi koyring. Í ár verður "Goodyear Classic" koyringin frá 23. til 24. august, og bjóða teir føroyingum, sum hava ellisakfør, at vera við. Goodyear gjalda fyri uppihaldi, og tað sum tað kostar at vera við til koyringina. Áhugaði kunnu venda sær til Super Dekk, telefon 314975, at fáa meira at vita um tiltakið.



# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**CITROEN SAXO 1.5D 3H**
Árg Jan-00, Km 64.500
Kr. 99.000.


**CITROÉN ZX 1.9D STC**
Árg Mar-96, Km 91.000
Kr. 86.000.


**CITROEN BERLINGO 1.9D 3H 5PERS**
Árg Sep-98, Km 81.000
Kr. 109.000.


**CITROEN XSARA 2.0HDI 5H**
Árg Nov-99, Km 92.000
Kr. 145.000.


**CITROEN XANTIA 1.9TD STC**
Árg Mar-99, Km 45.000
Kr. 160.000.

**MITSUBISHI PAJERO 2.8TDI**
Árg Sep-97, Km 82.000
Kr. 177.000.


**MITSUBISHI GALANT 2.0**
Árg Jun-92, Km 150.000
Kr. 37.000.

**MITSUBISHI CARISMA 1.6I 5H**
Árg Mar-97, Km 64.000
Kr. 105.000.


**FORD MONDEO 1.8 4H**
Árg Jun-01, Km 16.000
Kr. 210.000.


**JEEP CHEROKEE 2.5TD VAN**
Árg Jul-97, Km 80.000
Kr. 135.000.


**MAZDA DEMIO 1.3 5H**
Árg Feb-99, Km 50.000
Kr. 87.000.


**PEUGEOT 106 1.5D 3H**
Árg Mar-97, Km 100.000
Kr. 60.000.

**SEAT CORDOBA 1.9SDI STC**
KU 090
Árg Aug-99, Km 36.000
Kr. 115.000.


**SUZUKI BALENO 1.6I 4H**
Árg Apr-00, Km 27.500
Kr. 105.000.

Ivan Johansen Bilar
CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo


**VW POLO CLASSIC SDI**
Árg nov.96, Km 97.000. Diesel
NÝSÝNAÐUR. Kr. 85.000.


**VW POLO CLASSIC SDI**
Árg des.97, Km 110.000. Diesel.
Kr. 98.000.


**SEAT CORDOBA TDI**
Árg jul.2000, Km 85.000. Diesel.
Kr. 136.000.


**VW GOLF VARIANT SDI**
Árg jan.97, Km 88.000. Diesel.
Kr. 119.000.


**FORD COURIER VØRUVOGNUR**
Árg jun.98, Km 44.000. Diesel.
Kr. 78.000.


**FORD MONDEO 1,8I**
Árg nov.2000, Km 28.000. Bensin
Nýsýnaður. Kr. 168.000.

Audi SEAT
Bilasølan v/ Øssur Johannesen
tel 315354 - www.audi-vw.net


